> *– Tað er jú altíð ein ivi í eini slíkari kanning, men PISA er tann besta kanningin, sum vit hava at meta okkum eftir. Samfelagið er soleiðis í dag, at vit í útbúgvingarskipanini eru noydd at meta um avrik okkara. Og, at vit í yrkinum eru við í metingunum og allatíðina betra okkum.*
>
> *Anders Rusk, fyrilesturhaldari og formaður í finska lærara-fakfelagsskapinum OAJ*



# Stórt norðurlendskt summarskeið fyri lærarar og pedagogar

**Í hesum døgum eru 170 lærarar og pedagogar úr øllum Norðurlondum á skeiði í Hotel Føroyum. Skeiðið var sett 28. juli og varar inntil sunnudagin 2. juli. 25 føroyskir luttakarar eru við.**

SKEIÐ
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Tað er stóra norðurlendska lærara- og pedagogfelagið, Nordiska Lärerorganisationers Samråd (NLS), sum saman við nevnd, ið umboðar Føroya Lærarafelag og Føroya Pedagogfelag, skipar fyri skeiðnum. NLS, ið hevur høvuðssæti í Keypmannahavn er limur í stóra heimsumfatandi útbúgvingarfelagsskapur, Education International (EI), ið verjir áhugamálini hjá 29 milliónum lærarum og arbeiðandi í útbúgvingarskipan.

## Dygd í útbúgvingini

Aðaltætturin á summarskeiðnum er dygd í útbúgvingini, yvirskriftin hjá skeiðnum ljóðar á norðurlendskum: Kvaliteten i utbildningen – dialog og reflektion. Samskiftið fer fram á einum formi av norðurlendskum, sum málsliga savnar luttakararnar. Luttakararnir koma jú úr øllum norðurlondunum, frá Grønlandi í norðuri til Finnlands í landsynningi. Úr Føroyum er 25 luttakarar við, hesir 25 – lærarar, pedagogar og ein frá yrkisfelagnum – eru bodnir við og koma gjarna frá nevndum og líknandi. Á tílíkum skeiðum, sum NLS skipar fyri verða vanliga bara 8 luttakarar úr hvørjum landi bodnir, men vertslandið fær loyvi at hava fleiri við.

## Fyrilestrarnir

Allir fyrilestrarnir hava tilknýti til høvuðsevnið, tiltakinum og er sera væl nøgd við fyrilestrarnar, ið hava verið á skránni.

Allir fyrilesturhaldararnir eru neyvt útvaldir, flestu av teimum granskarar og sita í týðandi størvum.

Um ein hyggur at skránni, so sær ein, at hon er á tremur við kjaki, evnisverkstøðum og bólkauppgávum, ið skulu loysast, og so áhugaverdum fyrilestrum. Um kvøldarnar hava mentanarkvøld á í útbúgving viðgjørdir – bæði úr einum psykologiskum og einum fyrisitingarligum sjónarhorni.

## Metingararbeiðið í skúlanum á breddan

Tá ið hitt heldur ódámliga úrslitið frá PISA-kanningini, Føroyum viðvíkjandi, varð kunngjørt, vóru røddir frammi, ið eftirlýstu hendan partin í føroyska skúlaverkinum. lærarar, men eisini foreldrini, ið skulu vera við í metingararbeiðinum. Tey, sum standa á síðulinjuni skulu uppí.

Tað er sjálvsagt áhugavert við finsku útbúgvingarskipanini, sum støðugt hevur ligið í ovasta endanum í PISA-kanningum. Hvat er tað sum teir gera haryviri í Finnlandi? Hetta var ein afturvendandi spurningur hendan fríggjamorgunin, Sosialurin vitj- støðu herheima. Støðan viðvíkjandi eftirútbúgvingartilboðum er ein vanlukka, sambært henni. – Í 60unum hevði 1/10 av lærarum møguleika at eftirútbúgva seg hvørt ár, men nú er støðan nógv, nógv verri. Í hinum norðanlondunum er støðan als ikki á sama støði, sum okkara.

# Finnland ovast – PISA-kanningin



*Anders Rusk, fyrilesturhaldari og formaður í OAJ*

Anders Rusk helt fyrilestur um hvussu PISA-kanningin ávirkaði politikarar, foreldur, lærarar og tann finska lærara-fakfelagsskapin OAJ, har Anders er formaður. Hann letur væl at skeiðnum. – Lagið hevur verið sera gott her, og eg havi merkt ein stóran áhuga millum luttakararnar. Luttakarar hava eisini arbeitt í arbeiðsbólkum og hava víst stórt ágrýtni.

Spurdur um hvussu ein, sum finnlendingur, á hesum summarskeiðnum kennir tað, at Finnland hevur fingið so góð úrslit í PISA-kanningunum, sigur Rusk, at tað merkist væl. - Har er ein stórur áhugi og fleiri spurningar. Jú, vit finnlendingar eru sera væl umtóktir í skúlahøpi, játtar hann við einum smíli. – Heima í Finnlandi merkir ein eisini tann stóra áhugan, fleiri vitjandi fakfólk banka uppá dyrnar her. Og vit eru sera errin av góða úrslitini. Undan PISA-kanningini var tað eingin, sum hevði áhuga fyri finskum útbúgvingarpolitikki, men nú er hetta jú púra viðvent.

> *– Jú, vit vit finnlendingar eru sera væl umtóktir í skúlahøpi... Og vit eru sera errin av góða úrslitini. Undan PISA-kanningini var tað eingin, sum hevði áhuga fyri finskum útbúgvingarpolitikki, men nú er hetta jú púra viðvent.*

Men hvønn týdning hevur PISA-kanningin og hvussu umboðandi er hon fyri eina útbúgvingarskipan eftir hansara meting? - Tað er jú altíð ein ivi í eini slíkari kanning, men PISA er tann besta kanningin, sum vit hava at meta okkum eftir. Samfelagið er soleiðis í dag, at vit í útbúgvingarskipanini eru noydd at meta um avrik okkara. Og, at vit í yrkinum eru við í metingunum og allatíðina betra okkum.

## Ein føroyskur luttakari

Karl Martin Joensen var ein av teimum 25 føroysku luttakarunum. Hann var sum limur í Føroya Pedagogfelag boðin við á skeiðið. Hann metir skeiði hava verið gevandi. Fýra dagar við framúr væl frambornum fyrilestrum, arbeiðsuppgávum til luttakaran og ikki minst prát og umskifting av arbeiðsroyndum hava verið serliga gevandi. – Vit læra nógv av hvørjum øðrum á einum tílíkum skeiði. Evnið, vit í arbeiðsbólkum hava arbeitt við, hevur snúð seg um góðsku í útbúgvingini og um hetta at hugsa, reflektera yvir og eftirmeta arbeiðið, sum ein ger. Karl Martin greiðir frá, at tað, ein kemur heimaftur við, eftir eitt tílíkt skeið, skal síðan førast út í verk. – Tað var sera áhugavert at hoyra finska fyrilesturhaldaran, Anders Rusk, tosa um starvsroyndir í Finnland. At hoyra hvussu tey gera har er sjálvsagt áhugavert og viðkomandi. Har hava tey t.d. minni stýring og kontrol, og leggja dentin á ein meiri frælsan frálæringarhátt.



*Karl Martin Joensen, pedagogur og tiltakslimur í Føroya Pedagogfelag*